# Kjøtbein á vitjan

**Leygardagin 11. desember skipaði barnagarðurin í Gøtu fyri jólahaldi. Tað bleiv bleiv sungið, dansað og okkurt var til matna. Sjálvandi kom jólamaðurin eisini**

JÓLAHALD

*Orð og myndir, Jonhard Hammer*



*Børnini í Gjónni eru her avmyndaði saman við jólamanninum Kjøtbein*

Dagligdagurin hjá børnunum sum ganga í barnagarði í Gøtu hevur verið eitt sindur øðrvísi tilrættislagdur í desember. Stovurnar á barnagarðinum hava verið skipaðar sum verkstøð. Á Rókini hevur verið søgustova, har børnini hava hoyrt søgur, og tá ið tey eru blivin móð, hava tey kunna hvílt seg har. Ì Gjónni hava børnini klipt, líma og gjørt ymiskt jólaprýði til barnagarðin og at taka heim við. Sjónleikur og spøl vóru á Látrinum, har bæði børn og vaksin spældu saman.

Hellin var gjørd um til eina bakistovu. Har hava børnini lært at baka, og baksturin skuldi brúkast til Jólaveitsluna.

## Kjøtbein kom oman av Støðlafjalli

Tann stóri dagurin hjá børnunum var leygardagin 11.desember. Tá vóru foreldur og syskin bjóða til jólahald í barngarðinum. Og har var møguleiki at síggja og smakka, hvat børnini høvdu gjørt á teimun ymisku verkstøðunum.

Jólahaldið byrjaði við at dansa og syngja bleiv runt um jólatræið. Síðani las Kristvør jólaevangelið. Tá ið tað var liðugt, varð farið út á stovunar hjá børnunum. Har var dekkað borð við bakstri, sum børnini høvdu gjørt, og karamellurnar vóru eisini komnar á borið.

Knappliga kom ein Jólamaður á vitjan. Tað var Kjøtbein. Hann býr uppi á Støðlafjalli. Hann hevði pakkar við til øll børnini. Hann var sera prátingarsamur, og fortaldi fyri børnunum at teir vóru farnir í holt við at gera teir stóru pakkanar. Hetta arbeiði gekk fyri seg uppá Støðlafjalli. Hann helt at børnini høvdu skikkað sær væl í ár, so pakkanir fóru at verða stórir. Tá ið øll børnini høvdu fingið ein pakka, og tey eisini høvdu sungið fyri Jólamanninum, fór hann at rigga til at fara niðan aftur á Støðlafjall. Áðrenn hann fór út, fekk hann ein pakka frá børnunum í Gjónni. Annars lýddi Jólamaðurin mær í oyra, at tað verða ikki nógvir bleytir pakkar í ár. Orsøkin til hetta er, at Jólaommurnar eru so ringar av gikt, nú tað hevur regna so illa í seinastuni.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi, seinnapartin lot av ymsum ættum. Kavaælingur fyrrapartin annars sólglottar. Hitalagið millum frostmarkið og ÷3 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin fleyr til gul av norði og yvirhøvur turt, men seinnapartin lot av ymsum ættum og kavaælingur.Hitalagið millum ÷2 og +1 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið frískar hann vindin av landsynningi og møguliga kavaælingur. Hitalagið millum frostmarkið og ÷3 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og útnyrðingi og ælingur, partvís kavi og hitin millum 1 og 5 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -14 |
| Nuuk | -9 |
| Qaqortoq | -7 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -3 |
| Seyðisfjørður | -4 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 11 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | -- |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | -4 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | -4 |
| Bukarest | -1 |
| Paris | 2 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 10 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 2 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | -1 |
| Miami | 12 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 9 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt djúpt lágtrýst, 967 hPa. við Føroyar fer eystureftir. Eitt annað lágtrýst, 995 hPa. eystan fyri Hvarvið fer spakuliga móti Íslandi.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer í landsynning og brúgvalagið haðani verður væntandi yvir Føroyum leygarkvøldið. Køld luft rekur komandi dagarnar móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 15/12 kl. 06[00]–16/12. 06[00]. Hitin í gjár: 5,4°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° - Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 18,0 mm – mált frá 15/12 kl. 06[00]–16/12 kl. 06[00]
Avfallið higartil í desember: 135,9 mm

ÚF

**Morgunlestrar**
**20.– 24. desember.**

*Heini F. Petersen í Sandavági, lesur*

**Sálmar:**

Mánadagin 20. desember:
nr. 335 O, Guð, hav okkum við títt orð
nr. 332 Títt orð er, Guð, várt arvagóðs

Týsdagin 21. desember:
nr. 117 O, sigursæla náttarstund í forðum
nr. 118 Heilaga stund, tú á fold vára dalað ert niður

Mikudagin 22. desember:
nr. 106 Her koma, Jesus, tíni smá

Hósdagin 23. desember:
nr. 120 Mítt hjarta tilhald hevur

Fríggjadagin 24. desember:
nr. 127 Til okkum her á lágum støðum
nr. 132 Føgur er foldin

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

11. desember: Mánin næstur jørðini
12. desember: Tendring
18. desember: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. des | 11.05 | 23.29 | 10.05 | 22.29 | 10.20 | 22.44 | 00.42 | 13.05 | 01.42 | 14.05 | 09.20 | 21.44 | 08.20 | 20.44 | 11.20 | 23.44 | — | 12.20 | 10.50 | 23.14 | — | 12.05 |
| 18. des | — | 12.04 | 11.04 | 23.40 | 11.19 | 23.55 | 01.29 | 14.04 | 02.29 | 15.04 | 10.19 | 22.55 | 09.19 | 21.55 | — | 12.19 | 00.44 | 13.19 | 11.49 | — | 00.29 | 13.04 |
| 19. des | 00.40 | 13.15 | — | 12.15 | — | 12.30 | 02.40 | 15.15 | 03.40 | 16.15 | 11.30 | — | 10.30 | 23.05 | 00.55 | 13.30 | 01.55 | 14.30 | 00.25 | 13.00 | 01.40 | 14.15 |
| 20. des | 01.50 | 14.11 | 00.50 | 13.11 | 01.05 | 13.26 | 03.50 | 16.11 | 04.50 | 17.11 | 00.05 | 12.26 | 11.26 | 23.48 | 02.05 | 14.26 | 03.05 | 15.26 | 01.35 | 13.56 | 02.50 | 15.11 |
| 21. des | 02.33 | 14.55 | 01.33 | 13.55 | 01.48 | 14.10 | 04.33 | 16.55 | 05.33 | 17.55 | 00.48 | 13.10 | — | 12.10 | 02.48 | 15.10 | 03.48 | 16.10 | 02.18 | 14.40 | 03.33 | 15.55 |

5 707265 100050 >